# Met og landsliðsúttøka

**Umframt at nýtt føroyskt met varð sett í Vági um vikuskiftið, vórðu fimm nýggj nøvn tikin úr til føroyska svimjilandsliðið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so varð nýtt føroyskt met sett, tá sonevnda Suðuroy-Open kappingin í svimjing varð hildin í Vági um vikuskiftið. Tað var Karina Petersen úr Fuglafirði, sum tók fýra ára gamla metið hjá Maiken Petersen úr Havnar Svimjifelag. Tíðin hjá Karinu var 1.18.58, og var hetta 5/100 sekund undir gamla metinum.

Umframt at talan var um Grand-Prix kapping, so var talan eisini um úttøkukapping til NJM, sum í ár verður hildin í Malmø. NJM er norðurlendsk kapping fyri juniorar, og eru tað gentur føddar í '87-88 og dreingir føddir í '85-86, sum taka lut í hesari.

### Landslið og bronsunálir

Petur Heðin á Fløtti, landsliðsvenjari, var sjálvandi ein av áskoðarunum undir svimjikappingini, og hann nýtti høvið til at taka út fimm nýggjar svimjarar til svimjilandsliðið. Hesi eru Ingi Andreasen úr HS, Katrin Sørensen úr HS, Jóanness á Fløtti úr HS, Sonni Eliassen úr FS og so eisini nýggi metánarin, Karina Petersen úr FS.

Fyrsta uppgávan hjá hesum verður longu komandi vikuskiftið, tá svimjilandsliðið fer á venjingarlegu í Havn. Henda verður ætlandi samstundis skipað sum ein kapping fyri fremstu føroysku svimjararnar, og hvør veit, um ikki okkurt føroyskt met aftur verður sett á hesari.

Hartil svumu fýra av ungu svimjarum okkara somikið væl, at fýra bronsunálir vórðu latnar eftir stevnuna. Hesar vórðu latnar til Annu K. Eysturberg úr TS, sum svar 50 m frí í tíðini 0.35,6. Jutta Thomsen úr TS svam 200 m frí í 2.40,7. Kári J. á Høvdanum úr Skeggjum svam 100 m rygg upp á 1.19,6 og Pauli Øssurson Mohr svam 200 m frí í tíðini 2.33,9.

*Aðra staðni á síðuni síggjar úrslitini í einstøku kappingargreinunum.*



*Øll sjey føroysku svimjifeløgini tóku lut í Suðuroy Open, sum varð fyriskipað í Vági um vikuskiftið. Umframt fimm landsliðsúttøkur og eitt føroyskt met varð handanin av tirmum bronsunálum eisini á skránni*

*Mynd: Øssur Mohr*

## Samlaða býtið av heiðursmerkjum gjørdist hetta:

| Felag | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|
| HS | 17 | 9 | 14 |
| TS | 9 | 7 | 9 |
| FS | 6 | 3 | 4 |
| Flot | 2 | 1 | 1 |
| Ægir | 0 | 2 | 2 |
| Skeggjar | 0 | 1 | 1 |
| VS | 0 | 0 | 0 |



*Karina Petersen úr Fuglafjarðar Svimjifelag setti nýtt føroyskt met í 540 m bringu. Gamla metið var fýra ára gamalt, og var tað Maiken Petersen úr HS, sum átti hetta*

*Mynd: Øssur Mohr*

# Suðuroy Open - úrslit

**50 m. frí kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Lisbeth L. Joensen | HS | 0.28.6 |
| 2 | Benthe S. Andersen | TS | 0.28.9 |
| 3 | Shaila millum Garðarnar | TS | 0.29.8 |

**50 m. frí menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Dia Jacobsen | HS | 0.25.9 |
| 2 | Kristian Olsen | Ægir | 0.26.1 |
| 3 | Andrass Thomsen | HS | 0.26.6 |

**100 m. rygg kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersen | FS | 1.12.1 |
| 2 | Sára Ejdesgaard | TS | 1.14.4 |
| 3 | Annika Jacobsen | HS | 1.21.3 |

**100 m. rygg menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jóannes á Fløtti | HS | 1.04.1 |
| 2 | Andrass Thomsen | HS | 1.06.0 |
| 3 | Janus Olsen | HS | 1.06.1 |

**50 m. firvald kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Benthe S. Andersen | TS | 0.31.7 |
| 2 | Lisbeth L. Joensen | HS | 0.32.5 |
| 3 | Shaila millum Garðarnar | TS | 0.33.1 |

**50 m. firvald menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Dia Jacobsen | HS | 0.27.7 |
| 2 | Janus Olsen | HS | 0.29.5 |
| 3 | Kristian Olsen | Ægir | 0.29.8 |

**100 m. frí kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Benthe S. Andersen | TS | 1.03.9 |
| 2 | Lisbeth L. Joensen | HS | 1.04.1 |
| 3 | Sára Ejdesgaard | TS | 1.05.5 |

**100 m. frí menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Andrass Thomsen | HS | 0.56.9 |
| 2 | Kristian Olsen | Ægir | 0.57.5 |
| 3 | Jóannes á Fløtti | HS | 0.58.3 |

**200 m. blandað kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersen | FS | 2.36.8 |
| 2 | Sára Ejdesgaard | TS | 2.45.7 |
| 3 | Benthe S. Andersen | TS | 2.55.0 |

**200 m. blandað menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Beinir Danielsen | Flot | 2.41.2 |
| 2 | Kári J. á Høvdanum | Skeggjar | 3.00.4 |
| 3 | Erling Jacobsen | Skeggjar | 3.01.4 |

**100 m. firvald kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Shaila millum Garðarnar | TS | 1.19.1 |
| 2 | Anny Thorsen | HS | 1.27.6 |
| 3 | Anna K. Eysturberg | TS | 1.45.0 |

**100 m. firvald menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Janus Olsen | HS | 1.05.1 |
| 2 | Hanus Eysturdal | HS | 1.12.8 |
| 3 | Jákup Ø. Mohr | FS | 1.15.5 |

**4x50 m. blandað kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | TS1 | TS | 2.16.6 |
| | Sára Ejdesgaard | | |
| | Benthe S. Andersen | | |
| | Shaila millum Garðarnar | | |
| | Karin K. Eysturberg | | |
| 2 | HS1 | HS | 2.23.4 |
| | Rannvá Jacobsen | | |
| | Herborg Silja Strøm | | |
| | Lisbeth Joensen | | |
| | Heidi Andreasen | | |
| 3 | HS2 | HS | 2.35.8 |
| | Halla W. Reinert | | |
| | Annika Jacobsen | | |
| | Anny Thorsen | | |
| | Vár Jacobsen | | |



**4x50 m. blandað menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | HS1 | HS | 1.57.8 |
| | Jóannes á Fløtti | | |
| | Ingi Andreasen | | |
| | Dia Jacobsen | | |
| | Andrass Thomsen | | |
| 2 | HS2 | HS | 2.05.5 |
| | Janus Olsen | | |
| | Aksal Norðfoss | | |
| | Jón Absalonsen | | |
| | Egil Gunnarson | | |
| 3 | FS | FS | 2.12.3 |
| | Pauli Ø. Mohr | | |
| | Jákup Ø. Mohr | | |
| | Johan Martin Poulsen | | |
| | Sonni Eliasen | | |

**50 m. bringa kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersen | FS | 0.36.2 |
| 2 | Benthe S. Andersen | TS | 0.36.3 |
| 3 | Sára Ejdesgaard | TS | 0.40.3 |
| 3 | Herborg Silja Strøm | HS | 0.40.3 |

**50 m. bringa menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ingi Andreasen | HS | 0.31.8 |
| 2 | Per S. Hansen | Flot | 0.35.8 |
| 3 | Kristian Olsen | Ægir | 0.36.5 |

**200 m. frí kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Lisbeth L. Joensen | HS | 2.20.2 |
| 2 | Rannvá Jacobsen | HS | 2.20.3 |
| 3 | Sára Ejdesgaard | TS | 2.23.8 |

**200 m. frí menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Andrass Thomsen | HS | 2.02.5 |
| 2 | Janus Olsen | HS | 2.09.1 |
| 3 | Sonni Eliasen | FS | 2.09.4 |

**200 m. firvald kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Shaila millum Garðarnar | TS | 2.59.7 |

**100 m. bringa kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersen | FS | 1.18.5 FM |
| 2 | Benthe S. Andersen | TS | 1.22.4 |
| 3 | Lisbeth L. Joensen | HS | 1.26.7 |

**100 m. bringa menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ingi Andreasen | HS | 1.10.5 |
| 2 | Dia Jacobsen | HS | 1.12.7 |
| 3 | Per S. Hansen | Flot | 1.17.1 |

**4x50 m. frí kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | TS1 | TS | 2.01.7 |
| | Sára Ejdesgaard | | |
| | Karin K. Eysturberg | | |
| | Shaila millum Garðarnar | | |
| | Benthe S. Andersen | | |
| 2 | HS1 | HS | 2.02.8 |
| | Annika Jacobsen | | |
| | Helga Djurhuus | | |
| | Rannvá Jacobsen | | |
| | Lisbeth L. Joensen | | |
| 3 | HS3 | HS | 2.12.7 |
| | Halla W. Reinert | | |
| | Birita í Dali | | |
| | Herborg Silja Strøm | | |
| | Elida Bjarnadóttir | | |

**4x50 m. frí menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | HS1 | HS | 1.48.5 |
| | Jón Absalonsen | | |
| | Janus Olsen | | |
| | Egil Gunnarson | | |
| | Aksal Norðfoss | | |
| 2 | FS | FS | 1.56.3 |
| | Johan Martin Poulsen | | |
| | Jákup Ø. Mohr | | |
| | Sonni Eliasen | | |
| | Pauli Ø. Mohr | | |
| 3 | HS3 | HS | 2.01.1 |
| | Jóannes á Fløtti | | |
| | Andrass Thomsen | | |
| | Tróndur Olsson | | |
| | Ingi Andreasen | | |

**200 m. rygg kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rannvá Jacobsen | HS | 2.32.7 |
| 2 | Karina Petersen | FS | 2.34.6 |
| 3 | Sára Ejdesgaard | TS | 2.39.4 |

**200 m. rygg menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jóannes á Fløtti | HS | 2.16.3 |
| 2 | Janus Olsen | HS | 2.23.2 |
| 3 | Hanus Eysturdal | HS | 2.33.2 |

**100 m. blandað kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Benthe S. Andersen | TS | 1.13.1 |
| 2 | Karina Petersen | FS | 1.13.2 |
| 3 | Lisbeth L. Joensen | HS | 1.14.9 |

**100 m. blandað menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Dia Jacobsen | HS | 1.02.5 |
| 2 | Andrass Thomsen | HS | 1.04.5 |
| 3 | Jóannes á Fløtti | HS | 1.06.6 |

**50 m. rygg kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersen | FS | 0.34.1 |
| 2 | Sára Ejdesgaard | TS | 0.34.4 |
| 2 | Rannvá Jacobsen | HS | 0.34.4 |

**50 m. rygg menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Dia Jacobsen | HS | 0.29.8 |
| 2 | Jóannes á Fløtti | HS | 0.30.5 |
| 3 | Janus Olsen | HS | 0.30.7 |

**200 m. bringa kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Karina Petersn | FS | 2.51.0 |
| 2 | Benthe S. Andersen | TS | 2.56.7 |
| 3 | Karin K. Eysturberg | TS | 3.10.0 |

**200 m. bringa menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Per S. Hansen | Flot | 2.48.1 |
| 2 | Aksal Norðfoss | HS | 2.54.4 |
| 3 | Jákup Ø. Mohr | FS | 2.54.5 |

**4x100 m. frí kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | TS2 | TS | 4.26.1 |
| | Sára Ejdesgaard | | |
| | Karin K. Eysturberg | | |
| | Shaila millum Garðarnar | | |
| | Benthe S. Andersen | | |
| 2 | HS1 | HS | 4.27.9 |
| | Lisbeth L. Joensen | | |
| | Annika Jacobsen | | |
| | Rannvá Jacobsen | | |
| | Guðrun Magnussen | | |
| 3 | HS2 | HS | 4.58.0 |
| | Herborg Silja Strøm | | |
| | Halla W. Reinert | | |
| | Vár Jacobsen | | |
| | Anny Thorsen | | |

4x100 m. frí menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | HS2 | HS | 3.58.8 |
| | Rúni K. Hansen | | |
| | Aksal Norðfoss | | |
| | Jón Absalonsen | | |
| | Andrass Thomsen | | |
| 2 | HS3 | HS | 4.00.7 |
| | Hanus Eysturdal | | |
| | Janus Olsen | | |
| | Egil Gunnarson | | |
| | Jóannes á Fløtti | | |
| 3 | HS1 | HS | 4.11.4 |
| | Búi Rouch | | |
| | Ingi Andreasen | | |
| | Dia Jacobsen | | |
| | Tróndur Olson | | |

## Renna undir Vestmannasundi

**Sunnudagin fyri, at Vágatunnilin verður latin upp fyri almennari ferðslu, verður stór renni- og gongukapping gjøgnum tunnilin. Byrjað verður í Leynum, og prógv og heiðursmerki verða latin á Vágalandinum, tá liðugt er**

UNDIRSJÓVARRENNING
*Tíðindaskriv*

Fasta sambandið undir Vestmannasundi verður hátíðarhildið bæði áðrenn og aftaná, at tunnilin letur upp fyri almennari ferðslu. Eitt stórt tiltak verður sunnudagin 8. december, tá rennast ella gangast kann gjøgnum Vágatunnilin.

Tað eru Sandavágs Ítróttarfelag, SÍF, og felagið Bragdið, sum skipa fyri hesi rennikappingini.

Luttakararnir verða býttir sundur í fleiri aldursbólkar. Børn undir seks ár verða í einum bólki. Síðan verða bólkarnir býttir soleiðis: sjey til níggju ár - 10 til 12 ár - 13 til 16 ár og 17 ár og eldri.

Allir aldursbólkar vera bæði fyri gentur og dreingir. Tey, sum luttaka í bólkinum seks á og yngri, skulu vera í fylgi við einum vaksnum. Í aðrar mátar verða eingi krøv sett teimum, sum luttaka, onnur enn tey, at tey gjøgnumføra túrin. Áðrenn byrjað veðru at renna, fáa luttakararnir eitt luttøkuprógv, sum er ein T-shirt við áskrift, ið tey so er í, meðan runnið verður.

Talan er í grundini bæði um kapping og ikki. Fólk kunnu sjálvandi renna gjøgnum tunnilin og so vóna at verða fyrst og harvið vinna eitt heiðursmerki. Men ætlanin er, at øll skulu kunna vera við, so til ber eisini at ganga gjøgnum tunnilin.

Er onkur, sum situr í koyristóli, er eisini møguleiki at koma gjøgnum tunnilin við honum, um bert onkur er at koyra á. Barnavognar hava sjálvandi sama møguleika.

Sjálvt tiltakið byrjar við tunnilsmunnan Leynamegin, og runnið ella gingið verður so allan vegin gjøgnum tunnilin. Teinurin er settur til fimm kilometrar, sum er eitt lítið sindur longri enn sjálvur tunnilin.

Tá komið er á mál Vágamegin, fáa vinnararnir í hvørjum aldursbólki eitt heiðursmerki.

Luttakararnir møta við tunnilsmunnarnar tí megin, tey eru stødd, í góðari tíð. Vágafólk verða so koyrd við bussi gjøgnum tunnilin til Leynar, har renningin byrjar. Tá liðugt er, verða tey, sum skulu yvir aftur á Streymoynna, eisini koyrd upp á pláss aftur.

Á Vágalandinum fer SÍF at bjóða luttakarunum kakao og bollar, meðan tiltakið er, eins og burturluting eisini verður millum teirra, sum luttaka í tiltakinum.

Renningin byrjar sunnudagin 8. december klokkan 14.00 og heldur væntandi á einar tríggjar tímar ella so, alt eftir hvussu skjótt fólk koma ígjøgnum tunnilin. Luttakararnir møta við tunnilsmunnan Leynamegin í seinasta lagi klokkan 13.30. Vágafólk, sum fara at luttaka møta á Fútakletti klokkan 13.00 og verða so koyrd við bussi yvirum. Tey, sum eftir loknan túr, skulu aftur á Streymoynna, verða somuleiðis koyrd við bussi yvir um aftur.

Luttøkugjaldið er kr. 100,- tó luttaka børn undir seks ár ókeypis.

Tilmeldingarskjal er at finna í Sosialinum og Dimmalætting og skal gjaldast í Føroya Sparikassa í seinasta lagi 2. december. Har verður kvittan latin, sum skal havast við, tá møtt verður til renningina.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg